## Vánaligt hálvár

Fyrra hálvár royndist stak illa hjá donsku fiskivinnuni. Tað sæst í einum yvirliti, sum Fiskivinnustýrið hevur gjørt.

Yvirlitið vísir, at tað eru serliga ídnaðarskipini, sum hava fingið lítið burtur úr higartil í ár. Skipini fiskaðu heili 55 prosent minni enn fyrra hálvár í fjør, og vinningurin hjá skipunum var 54 prosent minni enn seks teir fyrstu mánaðarnar í fjør. Hjá skipunum, sum fiska til matna, gekst heldur frægari, men eisini tey høvdu afturgongd samanborið við fyrra hálvár í fjør. Afturgongdin hjá teimum var 21 prosent.

Formaðurin í danska fiskimannafelagnum, Thorkild Førby, sigur, at danska fiskivinnan er komin í sína ringastu kreppu nakrantíð. Hann gevur óskili á marknaðunum skyldina av teirri vánaligu gongdini.

## Fleiri arbeiðsleys

Arbeiðsloysi er ein støðugt veksandi trupulleiki í Noregi, og nú vísa tey seinastu tølini, at tann 30. juni vóru 10.000 fleiri norðmenn arbeiðsleysir enn tann 31. mars.

Meðal arbeiðsloysi í apríl-ársfjórðingi var 4,7 prosent, og tað er 0,7 prosentstig meiri enn í sama ársfjórðingi í 2002. Sambært hagstovuni vóru 110.000 norðmenn arbeiðsleysir í apríl-ársfjórðingi, og tað eru 16.000 fleiri enn eitt ár frammanundan. Av teimum arbeiðstøku monnunum vóru 5,0 prosent arbeiðsleysir, og hjá kvinnunum var arbeiðsloysið 4,2 prosent.

Norðmenn kunnu kanska ugga seg við, at gongdin í arbeiðsloysinum er tann sama at kalla allastaðni. Í Danmark vaks arbeiðsloysið úr 5,0 í 5,2 prosent, í Svøríki úr 5,2 í 5,4 prosent, og í øllum ES-londunum vaks arbeiðsloysið úr 7,9 í 8,1 prosent. Í OECD-londunum er gongdin tann sama. Har var arbeiðsloysið 7,0 prosent fyri einum ári síðani. Nú er tað 7,2 prosent.

## Iran hevur skjótt kjarnorkuvápn

Amerikanska blaðið Los Angeles Times vil vera við, at iranar eru næstan komnir á mál at gera landsins fyrstu kjarnorkubumbu.

Sambært blaðnum fáa iranar hjálp frá vísindamonnum úr Russlandi, Kina, Norðurkorea og Pakistan, sum standa fyri arbeiðinum at gera ta fyrstu iransku kjarnorkubumbuna. Blaðið vil vera við, at arbeiðið er komið so væl áleiðis, at Iran er ein størri kjarnorkuhóttan, enn grannalandið Irak nakrantíð var.

USA og altjóða kjarnorkustovnurin IAEA hava leingi roynt at fáa iransku myndugleikarnar at loyva óheftum eftirlitsmonnum at kanna landsins kjarnorkuverkætlan til botns, men til fánýtis. Iranar halda uppá, at teir ætla bert at nýta kjarnorkuna til orkuendamál.

## Vilja hava fornlutir

Myndugleikarnir í Egyptalandi vilja hava fatur á fleiri fornlutum, sum sambært egyptum eru endaðir ólógliga í Noregi.

Talan er um 17 fornlutir, og talan er yvirhøvur um prýðislutir av ymsum slagi. Egyptar siga, at tað var ólógligt at flyta lutirnar til Noregs, og at egyptiska stjórnin skjótt fer at venda sær formliga til norsku stjórnina við kravi um, at lutirnir verða sendir aftur til Egyptalands.

Fornminnissøvnini í Oslo og Bergen hava nakrar av teimum egyptisku lutunum, men søvnini skilja ikki egyptiska kravið. Á savninum í Bergen vísa tey á, at teir egyptisku lutirnir komu hagar fyri meiri enn hundrað árum síðani, og bæði í Bergen og Oslo verður víst á, at fleiri av lutunum komu til Noregs sum gáva frá egyptiska statinum. Tey halda tað tí vera løgið, at egyptar nú krevja at fáa lutirnar aftur.

UTTAN ÚR HEIMI

# Myndatól og fartelefonir kunnu vera bumbur

**Amerikonsku myndugleikarnir ávara nú flogfeløgini um, at ferðafólk kunnu fjala bumbur í myndatólum, fartelefonum og fløguspælarum**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Myndugleikarnir í USA fara nú at ávara heimsins flogfeløg um, at tað kann vera vandamikið at lata ferðafólk hava fartelefon, myndatól ella fløguspælara við sær umborð á flogførini.

Sambært sjónvarpinum CNN er amerikanska løgreglan undir einari húsarannsókn komin fram á eitt myndatól, sum vísti seg ikki at vera eitt vanligt myndatól. Inni í myndatólinum var eitt ein sokallað »stun gun«, sum við stórum elektriskum spenningi kann gera eitt fólk fullkomiliga lamið. Tólið varð funnið í einum húsum, sum limir í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda plagdu at halda til í, sigur CNN.

Amerikanska løgreglan heldur, at yvirgangsmenn kunnu finna upp á at fjala bumbur í ymsum tólum og at taka tey við sær umborð á flogfør, sum teir ætla at ræna. Tí fara myndugleikarnir nú at ávara flogfeløgini um vandan.

# Amerikanskir hermenn fáa aftur serviðgerð



Altjóða reglur um krígsførslu umfata ikki amerikanskar hermenn.

**Beint ímóti altjóða Geneve-sáttmálunum um krígsførslu hava amerikansku hermenninir í Liberia fingið vissu fyri, at teir kunnu ikki rættarsøkjast í øðrum londum**

KRÍGSBROTSVERK
*Árni Joensen:*

Einaferð í heyst skulu amerikanskir hermenn ætlandi setast í land í Liberia, har teir skulu loysa ta vesturafrikonsku friðarvarðveitandi herdeildina av. Men munur er á teimum treytum, sum hermenninir virka undir.

Gera amerikonsku hermenninir seg sekar í krígsbrotsverki ella øðrum brotum á altjóða reglur, meðan teir eru í Liberia, kunnu teir rættarsøkjast í sjálvum USA. Amerikanska stjórnin hevur júst tryggjað sær, at hermenninir kunnu ikki rættarsøkjast í nøkrum øðrum landi.

Men serreglur sum hesar stríða ímóti altjóða Geneve-sáttmálanum um krígsførslu og ímóti fleiri øðrum altjóða reglum so sum reglunum um fólkamorð og reglunum um píning. Sambært teimum hava øll lond skyldu til at rættarsøkja fólki, sum eru undir illgruna fyri at vera sek í krígsbrotsverki ella píning. Men USA vil ikki geva seg undir hesar reglur, tá tað snýr seg um landsins egnu hermenn.

- Tað er alla æru vert, at ST roynir at verja fólkið í Liberia ímóti ágangi, men samtyktin um sertreytir fyri teir amerikonsku hermenninar máðar støðið undan altjóða rætti, sigur Lotte Leicht, sum er leiðari í mannarættindafelagsskapinum Human Rights Watch.

Eisini í Amnesty International harmast tey sertreytirnar hjá amerikonsku hermonnunum.

- Samtyktin gevur teimum fulla verju ímóti fólkamorði, brotsverkum ímóti mannaættini og krígsbrotsverkum, sigur Yvonne Terlingen, sum umboðar Amnesty International á ST-høvuðsborgini í New York.

Í trygdarráðnum atkvøddu Frakland og Týskland blankt. Bretland og Spania atkvøddu fyri samtyktini um sertreytirnar hjá amerikonsku hermonnunum í Liberia.

ítróttur

Nr. 145 • mikudagur • 6. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tað treingist hjá Toda

**FCK hevur keypt brasilskan álopsspælara, sum sigst hava verið ein tann besti í svensku kappingini trý tey seinastu árini**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*



*Hans Backe kann nú velja og vraka millum ikki færri enn fimm álopsleikarar til tey bæði plássini í FCK-álopinum*

Í kvøld fer FCK at taka síðsta takið, áðrenn teir næstu vikurnar skulu til aðalroyndina ímóti Glasgow Rangers, sum fer at gera av, hvat av hesum báðum feløgunum skal eiga pláss í bólkaspælinum í Europa Cup fyri meistaralið. Todi Jónsson og liðfelagarnir fóru suður á Malta fyrrapartin í gjár.

Teir eru átjan spælarar í ferðalagnum, og millum teirra er Jörgen Pettersson, sum hevur verið skaddur í fleiri vikur. Nú er hann tøkur aftur, og sviin er kappingarneyti hjá Toda til álopspláss í kvøld. Uppgerðin á Malta, har FCK skal verja 4–1 leiðsluna frá fyrra dystinum ímóti Sliema Wanderers, verður at síggja á TV Danmark 1 rásini kl. 19.30 í kvøld.

### Nýggja hóttanin

Seinnapartin í fyrradagin boðaði FCK leiðlsan frá, at teir hava keypt ein brasilskan spælara, sum verður sagdur at vera ein orduligur bombari, umframt at hann sigst vera ein fínur og rættuliga undirhaldandi spælari.

Talan er um 23 ára gamla Álvaro Santon, sum í framtíðini fer at spæla í FCK troyggjuni við 18 talinum á rygginum. Hann hevur síðani 2000 verið í Helsingborg IF, har teir hava verið framúr væl nøgdir við hann. Men pengakassin er tómur, teir vóru noyddir at selja, og FCK treiv niður í fulla kassan. Í FCK hava teir tryggjað sær, at nýggi maðurin verður hjá teimum í fimm ár. Tað er ikki kunngjørt, hvussu nógv hann fer at fáa í løn, men tað er neyvan nakar ivi í, at hann verður millum teir tungu dreingirnar.

Síðani Álvaro Santon fyri trimum árum síðani kom til Helsingborg, hevur hann spælt 108 dystir, og hann hevur skorað 53 mál. 63 av dystunum hava verið í landskappingini, og í teimum hevur hann skorað 35 mál.

At FCK hevur gjørt íløgu í nýggjan álopsspælara ber sjálvandi við sær, at tað verður størri kapping. Frammanundan hava Zuma, Todi, Peter Møller og Jörgen Pettersson verið fremstu evnini til tvey álopspláss. Nú er ein komin afturat, og hann er neyvan keyptur við tí fyri eyga, at hann skal sita á beinkinum. Men Álvaro, sum hann verður nevndur, er ikki tøkur rættuliga enn:

– Hann er júst komin fyri seg eftir at hann hevur verið krossbandsskaddur. Honum tørvar dystarvenjing. Kanska verður hann tøkur undan returdystinum ímóti Glasgow Rangers, sum verður í Parkini seinni í mánaðinum – um vit megna at spæla okkum í triðja innleiðandi umfarið, segði FCK venjarin, Hans Backe, á tíðindafundi í Parkini seinnapartin mánadagin.

Skoðsmálið, sum venjarin gav nýggja spælaranum, er, at hann er ein komplettur spælari, sum er loyalur og stríðist og sum hevur stórt fótbóltsskil.

– Hetta er eitt sindur óvanlig eyðkenni fyri brasilskar spælarar, og eg eri sera fegin um, at tað hevur eydnast okkum at fáa hann til FCK, segði Hans Backe.

Nýggi spælarin verður sagdur at vera undirhaldandi at hyggja at, soleiðis sum Zuma er tað, og sjálvur er spælarin rættuliga fegin um at fáa møguleikan í FCK.

– Eg havi verið fegin um at vera í Helsingborg, men nú vóru umstøður ikki at halda fram har. Eg havi fylgt við FCK, og eg gleði meg nógv at spæla í Parkini, har tað altíð eru nógvir áskoðarar, sigur Álvaro Santon.

# Hálvur føroyingur í Coventry

**Fyrrverandi skotski landsliðsskiparin, Gary McAllister, sigur seg vera fegnan um, at hann hevur fingið málsókna miðvallaran við í hópin hjá sær**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hálvi føroyingurin, Claus Bech Jørgensen, sum hevur tey bæði seinastu árini hevur leikt við Bradford í næstbestu ensku deildini, skal komandi árið royna seg í Coventry.

Fyri bert fáum árum síðani var Coventry mest sum fastur partur av bestu ensku deildini, men eftir at teir fleiri ár á rað høvdu vunnið seg beint upp um niðurflytingarstrikuna, gekk tað at enda galið, og síðani hevur felagið roynt trupla leiklutin at umstilla seg til lívið í næstbestu deildini, har munandi minni peningur er at vinna.

### Málsøkin

Serliga í seinastas kappingarári fekk Claus Bech Jørgensen orð á seg sum ein sera vandamikil harri, og frá útgangsstøði sínum á miðvøllinum skeyt hann ikki færri enn 11 mál fyri niðurflytingarhótta Bradford.

Júst hesin eginleikin er helst eisini tann, sum fyrst og fremst hevur skapt áhugan í Coventry, sum seinnu helvt av seinasta kappingarári bert vann ein dyst og í seinastu fimm dystunum megnaðu teir bert at skora eitt mál.

Tað er fyrrverandi stórleikarin, Gary McAllister, sum nú er venjari hjá Coventry, og hann dylir ikki fyri, at hann er fegin um at hava fingið hálva føroyingin í hópin.

- Vit eru fegin um at hava fingið sáttmála við Claus. Hann er ein sera góður leikari við drúgvum royndum á hesum støðinum. Og so hevur hann eisini nøs fyri, hvar málið stendur, so eg ivist ikki í, at hann fer at styrkja um liðið.

Umframt Claus Bech Jørgensen hevur Coventry undan hesum árinum gjørt sáttmála við tríggjar álopsleikarar. Dele Adebola, Graham Barrett og Andy Morrell verða væntandi allir tríggir við, tá Coventry leygardagin fer á vitjan hjá Watford í fyrsta dystinum hetta kappingarárið.